# Skráin er ein skandala

**Magni Mohr, fysiskur venjari hjá B36, heldur tað vera púrasta burturvið, at landskappingadystir ikki verða fluttir, so spælarar kunnu fáa neyðugu hvíldina, tá strævnar altjóða uppgávur hava verið á skránni**

HVÍLD

*Jákup Mørk*

ÍBV, HB, FCM, Skála, NSÍ, FCM, VB. Tað er dystarskráin, sum B36 hevur havt seinasta lítla mánaðin. Ein dystarskrá, sum veruliga hevur fingið ilt í Magna Mohr, sum er fysiskur venjari hjá B36.

- Eg vil kalla tað fyri skandaløst, at atlit ikki verða tikin til, at spælararnir eisini hava tørv á hvíld. Sum minsta krav, so átti hesin dysturin at verið fluttur til mánakvøld, og tað sama var eisini galdandi eftir fyrra dystin móti FCM. Tá var tað ætlanin, at vit skuldu spæla leygardag, men tað varð so flutt til sunnukvøld. Tað merkti so hinvegin, at Ingi ikki fekk somu hvíld, sum hinir spælararnir í landsliðshópinum, og tað er so heldur ikki rættvíst mótvegis honum, heldur Magni.

- Tað snýr seg heilt einfalt um, at føroyskir spælarar eru ikki vanir við at spæla tveir dystir um vikuna, men tað er so skráin, sum vit hava havt. Og tá skuldi tað verið lagt soleiðis til rættis, at vit hóast alt fingu nakað av hvíld, sigur hann.



*B36 er í dag eins væl fyri sum eitt superligulið, tá tosað verður um renniorku, staðfestir Magni Mohr*

Tað er tó fleiri, sum hava bitið merki í, at B36 hóast alt er komið so nøkunlunda heilskapaðir ígjøgnum strævnu skránna. Hvussu kanst tú sum fysiskur venjari hjálpa til í so máta?

- Tað er fyrst og fremst við dosera venjingina. Hendan seinsta mánaðin hava vit at kalla als ikki vant fysiska venjing. Í øllum førum ikki teir spælarar, sum hava spælt alla tíðina. Hinvegin hava vit vant harða venjing við teimum, sum ikki hava spælt so nógv.

### Á superligustøði

Júst hetta við at hava ymsar venjignarætlanir til ymsar spælarar er nakað, sum Magni hevur lagt stóran dent á, og hann staðfestir, at hetta er neyðugt, um venjingin skal gera nóg stórt gagn.

- Tað er jú ymiskt, hvussu einstøku spælararnir orka. Og tað er eisini ymiskt, hvussu spælarar reagera upp á dystir og venjing. Tí hava vit tríju hvørja viku ymsar testir, har vit kunnu máta, hvussu væl spælarin er fyri, og so verða venjingarskráir lagdar fyri ymsu spælararnar. Tí tú mást hugsa um einstaka spælaran, um tú skalt fáa optimalt burturúr.

Og hvat siga hesar testirnar so um spælararnar. Eru teir nóg væl fyri?

- Tosar tú um konditión og rennikapasitet, so er B36 í dag fult á hædd við eitt danskt superligulið. Hinvegin, so restar enn nakað í, um tosað verður um skjótleika og styrki í nærdystum, og tað er nakað, sum tað skal arbeiðast við.

At enda spurdu vit Magna, hvørt hann heldur, at strævna skráin kann koma at kosta í seinastu dystunum, nú kappingin av álvara er komin til endaspurtin.

- Tað veit eg ikki. Tað eru tvær vikur til næsta dystin, so nú fáa spælararnir um ikki annað hvíld. Her er stóri trupulleikin hjá okkum helst, at tað er sera trupult at halda eini góðari venjingarstøðu yvir eitt longri tíðarskeið. Tað fáa vit so at síggja, um tað fer at eydnast, sigur Magni at enda.

B36-VB 1-0 (0-0):

# B36 skavaði trý stig heim

**Fyri tað nógva av dystinum átti heimaliðið greiða yvirvág. Men seinastu 20 minuttirnar setti strævna dystarskráin síni týðiligu spor, tá VB var um reppið at tryggja sær javnleikin**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um sjeynda dystin innan ein lítlan mánað hjá B36, tá teir sunnudagin tóku ímóti VB. Ein dystur, sum B36 hevði royndt at flutt til mánakvøldið, men tá hetta varð noktað teimum, var ikki stórt annað at gera enn at spæla.

### Framrættað B36

Og fyrstu longu løtuna tóktist tað heldur ikki bila stórvegis hjá vertunum, at talan hevði verið um somikið strævna skrá. Við Óbi millum teir fyrstu ellivu var útgangsstøðið nakað meira framrættað, enn tað oftanir hevur verið, og saman við verjukenda útgangsstøðinum hjá VB, merkti hetta, at talan fyri tað nógva gjørdist um eina ógvuliga greiða B36-yvirvág.

Hetta gav eisini fleiri hálvar og heilar møguleikar, men fyri steðgin gekk illa at umseta hesar til mál. Eisini hóast flestu áskoðarar kring vøllin mundu síggja bóltin í meskunum ta einu ferðina, tá Bjarni Johansen onkursvegna refleksbjargaði roynd úr fýra metrum.

Uppskriftin hjá VB var so at dúva upp á kontra-álop, men hesi gjørdust sjáldan vandamikil. Einamest tí spælið hjá árstalsfelagnum var somikið væl skipað, at teir sjáldan seldu seg sjálvar í verjupartinum.

### Møðin merktist

Eftir steðgin helt sama spælið fram. Munurin var kanska fyrst og fremst, at tað nú eydnaðist B36 at skora eftir tíggju minuttum, tá Bjarni Johansen ikki helt skotroynd frá Inga Højsted. Mikkjal Thomassen, sum ivaleyst var besti maðurin á vøllinum hendan dagin, var skjótur á returinum og skumpaði í tóma málið til stóra frøði hjá viðhaldsfólkinum.

B36 kundi eisini økt lítla løtu seinni, tá ein púra blankur Óbi stútaði fram við málinum, men spakuliga kom møðin á liðnum til sjóndar. Høvdu vágbingar í størri mun sansað møðina, sum nú fór at gera um seg, kundu teir kanska veruliga sett seg á dystin, men tað gjørdu teir tó ikki. Hinvegin komu mótálop teirra alsamt betri ígjøgnum B36-miðvøllin, sum als ikki megnaði at halda fast um stóra renniarbeiðið, sum hevur eyðkent liðið í ár.

Og tá vágbingar so eisni settu frískar menn á vøllin, komu eisini møguleikar. Eingin av hesum var tó størri enn tann, sum Dan Djurhuus fekk við handara stólpa. Innskifti Jakob Skaaning royndi seg við skoti, og tá hetta varð avrættað, gjørdist Dan púrasta leysur, men úr fimm metrum sendi hann bóltin niðan á tennis-vøllin, og so spurdist ikki meira úr teirri royndini.

### Sóu møguleikan ov seint

Tað var sjónligt, at tað hjá B36 fyrst og fremst ráddi um at stríða seg til ein sigur í hesum dystinum. Og tá tað málið varð rokkið, vóru spælarar og venjarar meira enn nøgdir. Eisini hóast liðið onkra tíð hevur spælt bæði betri og skjótari fótbólt.

Hinvegin var ikki sørt, at vágbingarnir iðraðu seg. Kanska serliga tí, teir ikki høvdu verið heilt so greiðir um, hvussu moyrir mótstøðumenninir í veruleikanum vóru. Eftir eina skrá, sum ivaleyst man teljast millum strævnastu mánaðirnar í søguni hjá felagnum, var ikki nógv juice eftir í B36 hendan dagin. Og tá krútið var uppi, hevði VB ein heilt stóran møguleika at fara avstað við bæði einum og trimum stigum.

Tað kostaði tó í so máta, at tað gekk ov long tíð, áðrenn tað av álvara varð farið eftir møguleikanum, og tá dómarin so bríkslaði fyri seinastu ferð, var tað í veruleikanum ov seint.

## Fakta um dystin

**B36-VB 1-0 (0-0)**
**1-0:** Mikkjal Thomassen, 55.
**Dómari:** Petur Reinert. Gav sum heild eina góða mynd, men til tíðir tóktist linjan tó at sveiggja nakað nógv. Og gulu kortini vórðu kanska spard dekan ov nógv.
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen, Klæmint Matras, Pól Thorsteinsson (Bárður H. Joensen, 75.), Alex dos Santos - Niels Joensen, Ingi Højsted, Mikkjal Thomassen, Bergur Midjord (Levi Hanssen, 86.) - Allan Mørkøre, Okeke Obele Onyebuchi (Thomas Hans Rubeksen, 70.)
**GK:** Mikkjal Thomassen, 62.
**VB:** Bjarni Johansen - Mortan úr Hørg, Suni úr Hørg, Anders Sørensen, Jákup Olsen - Poul N. Poulsen (Jakob Skaaning, 77.), Milan Kulic, Edvard Ble, John Poulsen (Jón Krosslá, 72.) - Dan Djurhuus, Nenad Zivanovic
**GK:** Mortan úr Hørg, 83.